Fram—SÍ 1—10 (1—4):

Stórsigur til SÍ

Sørvingar vunnu stórsigur á Fram í triðju deild

Leygardagin byrjaði landskappingarnar í fótbólti og eisini í triðju deild vórðu fleiri dystir leiktir.

Stórsigrar

Fleiri av hesum dystum endaðu við stórsigrum.

T.d. vann B71 av Sandi 11—0 á NSÍ, í einum dysti, ið varð leiktur inni í Runavík.

11—0 vann SÍFa eisini á Streymi í einum dysti, ið varð leiktur í Sandavági og TBa vann við seks málum móti einum á TBb

Í Havn møttust Fram og SÍ og vunnu sørvingar henda dyst við 10 málum móti einum aftaná at teir í hálvleikinum høvdu verið á odda við fýra málum móti einum.

Hini úrslitini úr triðju deild og úr hinum deildunum standa á forsíðuni á ítróttarískoytinum.

Jónsvein Hovgaard, málverji hjá Fram bjargar her. Ikki var hann altíð so heppin leygardagin. Ikki minni enn 10 ferð noyddist hann í netið eftir bóltinum, meðan liðfelagar hansara bert megnaðu at skjóta eitt mál í hinum endanum av vøllinum

Badminton:

Kvinnur eru nú við á landsliðnum

Leiðbeinarar frá D.D.G.U. koma til Føroyar í mai mánað

Íslendska badmintonsambandið hevur nú góðtikið uppskot badmintondeild ÍSF's um at kvinnur eisini skulu vera við á landsliðnum.

»Mixed-double«

Næstu ferð vit møta Íslandi verða leiktir tríggir einmansleikir fyri menn tveir tvímansleikir fyri menn, ein einmansleikur fyri kvinnur og ein sonevnd »mix-double«.



Eru úttiknir

Leikarnir til landsliðsvenjingina eru longu nú úttiknir og verður endaliga úttøkan áðrenn 11. mai, tá tríggir vegleiðarar (instruktørar) frá D.D.G.U. (De danske Gymnastik og Ungdomsforeninger), koma higar at halda skeið

Opin kapping

Skeiðið verður hildið í døgunum 11., 12. og 13. mai, og er ætlanin at skipa fyri opnari kapping øll trý kvøldini.

Um tippað verður, at heimaliðið (fyrst nevnda liðið) vinnur, skal setast eitt 1-tal í raðið undir »1«. Um tippað verður javnleikur, skal eitt x setast í raðið undir »x«. Um tippað verður, at útiliðið (aftara liðið) sigrar, skal setast eitt 2-tal í raðið undir »2«.

Bert eitt tekin kann setast út fyri hvønn dystin.

Um tekin verða sett í skeivt rað, er seðilin ógildigur. Setast skula bert 1-tøl í »1-raðið«, bert x í »x-raðið« og 2-tøl í »2-raðið«.

Bæði tipsrøðini mega verða eins útfylt. Raðið til høgru er eftiransingarrað tygara, soleiðis at tygum síggja, hvussu innsenda rað varð útfylt.

Tipsseðilin verður at senda til: SOSIALIN, postrúm 76, 3800 Tórshavn í einum brævbjálva, merktur »Tipping«, og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin áðrenn leikdagarnar.

Navn: _____ **1**

Bústaður: _____

Hetta er eftiransingarseðil tygara

Leikdagar 5. og 6. mai

DYSTIR		1	X	2	1	X	2
ÍF—MB	(1. deild)						
HB—NSÍ	(1. deild)						
VB—B36	(1. deild)						
KÍ—TB	(1. deild)						
Royn—KÍ	(2. deild)						
Fram—GÍ	(2. deild)						
EB—SÍ	(2. deild)						
B71—B36	(3. deild)						
ÍF—KÍ	(3. deild)						
Sumba—TBa	(3. deild)						
B68—St.ÍF	(3. deild)						
Streymur—MB	(3. deild)						

Støðan

1. deild

HB	1	4—1	2
ÍF	1	3—1	2
B36	1	3—1	2
TB	1	2—0	2
NSÍ	1	1—3	0
KÍ	1	1—3	0
MB	1	0—2	0
VB	1	1—4	0

2. deild

B68	1	4—0	2
GÍ	1	4—2	2
Fram	1	2—1	2
HB	1	1—1	1
SÍ	1	1—1	1
EB	1	1—2	0
Royn	1	2—4	0
KÍ	1	0—4	0

Unglingadeildin:

HB	1	5—1	2
KÍ	1	2—1	2
NSÍ/B68			2
TB	0	0—0	0
B36	1	1—2	0
LÍF	1	1—5	0
ÍF			0

III. deild

Bólkur A:			
TB a	1	6—1	2
Sumba	1	4—0	2
Royn	0	0—0	0
VB	1	0—4	0
TBb	1	1—6	0
Bólkur B:			
B71	1	11—0	2
Skála	1	4—0	2
B36	1	3—1	2
B68	1	1—3	0
St.ÍF	1	0—4	0
NSÍ	1	0—11	0
Bólkur C:			
SÍFa	1	11—0	2
SÍ	1	10—1	2
MB	1	3—2	2
EB	1	2—3	0
Fram	1	1—10	0
Stríeymur	1	0—11	0
Bólkur D:			
LÍF	1	4—0	2
GÍ	1	3—0	2
KÍ	0	0—0	0
SÍF b	1	0—3	0
ÍF	1	0—4	0

Lesið um ítrótt í SOSIALINUM

Havnar Fimleikafelag

Havnar Fimleikarfelag hevur framsýning í ítróttarhøllini uppi á Hálsi 26/4 kl. 19.30 og í høllini á Stórheyggi 28/4 kl. 16 við luttøku av teimum elstu liðunum.

NEVNDIN

Venjaraskeið

Skeið fyri venjarar í badminton verður í Ítróttarhøllini í Havn 11., 12. og 13. mai 1979.

Lærarar vera 3 instruktørar frá DDGU. Tilmelding til badmintondeild ÍSF's í seinasta lagi 1. mai 1979.

BADMINTONDEILDIN